

# EEDS A
# LD ON TO

## THE DREAMS

- Bólkurin sá dagsins ljós í 2004
- Limirnir eru Hans Edward Andreasen, Heini Mortensen, Eirikur Gilstón Corfitz Andersen og Heini Gilstón Corfitz Andersen
- The Dreams fekk gjøgnumbrot í Føroyum í 2006, tá fløgan Tazy kom á gøturnar. Sangurin "Sasasasa" var hin best dámdi.
- Útgávan "Den Nye By" kom í 2008. Fløgan var sera væl dámd í Danmark, har føroyingarnir millum annað rukku tindin á Boogie-listanum við tveimum sangum
- Fløgan "Revolt" kom út í ár. Sangirnir "Revolt" og "Under the sun" eru við at vinna frama í Evropa.

**» - Eg vaks upp í einum "hard-core" umhvørvi í Havn, og tað var ikki kul at práta um kenslur. Eg royndi at gera vart við trupulleikan, men vinmenninir høvdu ikki peiling av, hvat eg tosaði um.**

## FAKTA:

**Navn:** Hans Edward Andreasen
**Aldur:** 26 ár
**Føðingardagur:** 12. november í 1983
**Útbúgvin sum bakari**
**Arbeiði:** Tónleikari
**Bólkur:** The Dreams

**» - Mamma væntaði ongantíð, at eg fór at standa meg sum tónleikara.**

*- Hans Edward Andreasen tók stig til bólkin The Dreams fyri seks árum síðan. Við kensluligum, rastleysum og deprimerandi tekstum, hevur havnarmaðurin vunnið sær serstøðu í føroyska tónleikaheiminum. Hann er millum fremstu tónasmiðirnar í landinum*

Mynd: Jens Kristian Vang